MENTAMÁLARÁÐIÐ

# FÓLKASKÚLIN

# FØROYSKT
# 9. FLOKKUR

Týsdagin 15. mai 2012
kl. 08.30 - 12.30



Loyvdir hjálparmiðlar: Orðabøkur

# Vel eitt av hesum evnunum og skriva um tað:

## 1. Eminem aka Slim Shady ..................................................s. 3

- Greina og tulka myndina  Eminem aka Slim Shady
- Hvussu sæst dysturin millum tað góða og tað ónda í myndini?

Mynd: Beinta av Reyni, ”Eminem aka Slim Shady”, 2006

*Yvirskrift:* **Eminem aka Slim Shady**

## 2. Etingarólag ..................................................................s. 4-5

- Greina og tulka tekstin. Legg dent á huglagið
- Greið frá sambandinum millum Jessicu og apuna
- Hugleið um evnið og um, hví so nógv ung fólk munnu verða rakt av etingarólagi

Tekstur: Judith Fathallah úr *”At temja apuna”*, 2006. Týtt hevur Malan Háberg

*Yvirskrift:* **Etingarólag**

## 3. Lítli fuglur .................................................................. s. 6-7

- Greina og tulka yrkingina ”Lítli fuglur”
- Samanber boðskapin í yrkingini við tekstin og myndirnar: ”Tjaldur ver vælkomið til okkum heim”
- Sig tína hugsan um dálking

Tekstur: Annfinn T. Nielsen, ”Lítli fuglur”, 1987

*Yvirskrift:* **Lítli fuglur**

## 4. Skiftisnæmingur ......................................................... s. 8-9

- Ger ein stuttan samandrátt av øðrum brævinum
- Við íblástri frá brøvunum skalt tú skriva um, hvar tú hevði ynskt at farið sum skiftisnæmingur, um tú fekst møguleikan. Grundgev svar tíni

Tekstir: Jón á Steig, skiftisnæmingur í Finnlandi, 2011 og Arnfríð Højgaard, skiftisnæmingur í Nýsælandi, 2011

*Yvirskrift:* **Skiftisnæmingur**

## 5. Góða dagbók ......................................................... s. 10

- Lýs kenslurnar hjá gentuni
- Skriva síðan dagbókina út frá kenslum hennara

Tekstur: Lydia Didriksen úr *”Skuggar”*, 1990

*Yvirskrift:* **Góða dagbók**

# 1 Eminem aka Slim Shady

- Greina og tulka myndina Eminem aka[1] Slim Shady
- Hvussu sæst dysturin millum tað góða og tað ónda í myndini?



Beinta av Reyni: ”Eminem aka Slim Shady”, 2006
Olja á lørift, 270 x 200 cm

[1] Aka stytting fyri **a**lso **k**nown **a**s = eisini kendur sum

# 2 Etingarólag

- Greina og tulka tekstin. Legg dent á huglagið
- Greið frá sambandinum millum Jessicu og apuna
- Hugleið um evnið og um, hví so nógv ung fólk munnu verða rakt av etingarólagi

*Helt eg meg framvegis vera feita?*

*Ja, av og á. Eg kundi hyggja í speglið og síggja uppbólgnaða fiti, serliga á búkinum. Eg visti, at eg sá meg sjálva størri, enn eg var, tí eina viku undan jólum dragsaði mamma meg við út at keypa.*

*”Kundi tú hugsað tær hesar?” Hon peikaði á einar buksur, stødd 36. Eg hugdi at teimum og físti.*

*”Tú tvætlar. Hasar buksurnar eru til fólk sum Katie Albright.”*

*Katie Albright var yvirkløn. Hon hevði gingið í barnaskúla saman við mær. Hon var og hevur altíð verið høg og kløn sum eitt kustaskaft við smølum akslum og mjadnum. Mamma hennara segði, at hon át ikki væl. Men hon át sanniliga sjokulátu og fronsk epli og alt, henni lysti, men hon tók ikki eitt gramm uppá. Hon vaks bara í hædd. Nú í níggjunda flokki hevði hon framvegis hvørki mjadnar ella bringu at tosa um. Eingin misunti henni, uttan eg. Hepna Katie kundi eta alt, hon vildi, uttan at taka uppá.*

”Trúgv mær, hesar passar tú,” segði mamma. Og tað gjørdi eg.

……….

…………

…………

Eg hevði noktað at etið meginpartin av morgunmatinum, bønað, ”eg fái ikki, eg fái ikki, eg verði sjúk,” og at enda hevði mamma givið skarvin yvir, áðrenn eg fór at gráta og øsa meg. Nú fór hon og kom aftur við einari góðgætisstong.

”Et hesa.”

”Nei!” Ræðsla.

*”Etur tú hatta, verður tú stór og tjúkk,”* hvesti ræðuliga røddin, og eg trokaði likamligu svongdina frá mær – tað hevði størri týdning at sissa sinnið. ”*Stór og tjúkk, ógvuslig, hygg at hasum, fylt við feitti og kaloriun……”* Nú tóktist stongin vamlislig, eitrandi, og magin á mær trekti seg saman av tankanum. Eg læsti varrarnar saman.

Mamma bendi seg niður á gólv og hugdi at mær eina góða løtu. ”Jessica,” segði hon varisliga, ”hví fært tú ikki?” Andlitið á henni var óttafult. Eg kendi eyguni á mær spíla seg so út, so at tey mugu hava sæð vitleys út.

”Tí at,” stunaði eg, ”tað er henda røddin. Ein rødd innan í høvdinum á mær.”

Tekstbrot úr skaldsøguni *”At temja apuna” hjá Judith Fathallah, 2006. Malan Háberg týddi úr enskum í 2008.*




**Apan** ímyndar tíðum/m.a. tað ónærisliga, forvitni, tað óreina, tað ónda í menniskjanum.
Í *buddhismuni* ímyndar apan tað tápuliga, glúpska og kradduta.
Í *Kina* stendur hon fyri sviki, umskapan, tí óhumska, tí ljóta.
Í *kristindóminum* umboðar apan m.a. girnd, snildi, synd, ósømd, leyslevnað, fáfongd.

*Kelda: Leysliga umsett úr Politikens symbolordbog*

# 3 Lítli fuglur

- Greina og tulka yrkingina ”Lítli fuglur”
- Samanber boðskapin í yrkingini við tekstin og myndirnar: ”Tjaldur ver vælkomið til okkum heim”
- Sig tína hugsan um dálking

LÍTLI FUGLUR

1. Sig mær lítli fuglur, hví flýgur tú so seint?
Hvat er tað, sum bagir, hvat hevur teg nú meint?
Hví ert tú so svartur, har ið hvíta dúnið var?
Sig mær lítli fuglur, hvat er hent við tær?

2. Jú, nú í morgun, eg fleyg mær ein túr,
út yvir havið, eg lá upp á lúr
eftir eini sild, ella hvat ið har nú var,
at hava heim við til pisurnar hjá mær.

3. Tá fongurin var fingin, mót landi vendi eg,
tá møðin meg nívdi, á sjógv eg setti meg,
fyrst tá rakti eg við, men tá var ov seint hjá mær,
at havið var dálkað, og spilt í olju var.

4. Í evjuni eg stríddist, eg mátti sleppa heim
til mínar svongu pisur, og føði geva teim.
Eg vann til síðst, men visti, at nú deyðadømd eg var,
eg veit ei, um eg vinni heim til pisurnar hjá mær.

5. Høvdu vit tó kunnað lært um henda sorgarleik,
um henda lítla fuglin, ið ei ungar sínar sveik.
Flest øll vita um tað, men støðan versnar dag um dag,
vit halda á at dálka, líka blind og líka glað.

Annfinn T. Nielsen, 1987

# TJALDUR VER VÆLKOMIÐ TIL OKKUM HEIM

“Tjaldur ver vælkomið til okkum heim…..”

Ja, enn einaferð bjóðaðu vit tær vælkomnum heim aftur til
okkara!
Vit saknaðu teg og vóru væl fyrireikað at taka ímóti tær –
tú okkara tjóðfuglur!
Eins og altíð, so lá lesullin klár á traðunum[1], so tú
kundi fjálga tær føturnar…..
Nylonið lá eisini klárt til at styrkja um lesullina, so hon helt enn
betur, tá ið hon skar beinini av á tær….
Var tað ikki nóg mikið, lá nógv annað klárt at taka ímóti tær –
togendar, rustaðar hegnrullur, ymisk bond og enntá píkatráður,
so ikki kanst tú siga annað enn, at tú vart okkara vælkomni gestur.
Tú okkara tjóðfuglur!

[1]Hvørjumfall fleirtal av kvennkynsorðinum ein trøð

*Kelda: jenskjeld.info*

*Jens-Kjeld Jensen er serfrøðingur í føroyskum fuglum og skordýrum*





# 4 Skiftisnæmingur

- Ger ein stuttan samandrátt av øðrum brævinum
- Við íblástri frá brøvunum skalt tú skriva um, hvar tú hevði ynskt at farið sum skiftisnæmingur, um tú fekst møguleikan. Grundgev svar tíni



***Jón á Steig er 16 ára gamal. Hann er í løtuni staddur í Finnlandi sum skiftisnæmingur. Jón hevur sent okkum eina frásøgn um ár sítt í Finnlandi.***

Eg eri skiftisnæmingur í Finnlandi, eg eri 16 ár og eiti Jón. Eg búgvi í Vantaa, sum liggur einar 10-15 minuttir frá finska høvuðsstaðnum, Helsinki. Tað fyrsta eg hugsaði, tá ið eg kom úr flogfarinum var ”Hm… nógv trø.” Hetta var fyrsta fatanin, eg fekk av Finnlandi! Tá var tað ikki eingongd gingið upp fyri mær, at eg skuldi vera har í eitt heilt ár!
Nú siti eg so her, skjótt 4 mánaðir farnir, og stórtrívist. Trøini hugsi eg ikki so nógv um. Eg eri vorðin vanur við tey, men framvegis er nógv eftir hjá mær at venja meg við hetta árið sum skiftisnæmingur.

Orsøkin til, at eg valdi Finnland, var, at eg helt tað vera spennandi at fáa meira at vita um hetta landið í Norðurlondum, sum ikki hevur nakra serliga mentanarliga relation til hini. Besta dømið má vera málið. Vit kunnu jú royna at samanbera svenskt, føroyskt og finskt, trý norðurlendsk mál: En, två, tre – Eitt, tvey, trý – Yksi, kaksi, kolme. Øgiliga ørðvísi.

Eg fái nokkso nógvar spurningar frá fólki, um hví eg fór til eitt norðurlendskt land, tá ið tað hevur so nógv til felags við Føroyar! Og sjálvandi fari eg so at hugsa, at tey hava rætt. At eg eri farin skeivur, at eg nokk heldur átti at farið til Suðuramerika, Miðevropa ella Ásia! Men eg angri ikki petti, at eg kortini fór til Finnlands. Mær dámar væl Finnland. Eg havi eina deiliga vertsfamilju, deilig vinfólk og royni at læra málið so væl, sum eg nú kann. Eg eri higartil øgiliga væl nøgdur!

Eg búgvi hjá einari vertsfamilju við fýra fólkum – mammu, pápa, systur og beiggja. Ein rættiliga vanlig norðurlendsk familja. Tá ið tú ert skiftisnæmingur skalt tú venja teg við gerandisdagin hjá øðrum fólkum. Hetta kann vera torført til tíðir, og summi enda tíverri við at flyta til eina aðra familju. Eg mátti skifta familju fyrr í ár, men hetta var av øðrum orsøkum og onki torført.
Nógv í finska gerandisdegnum er eins og í Føroyum, men eitt sum er øðrvísi, er finski maturin. Finskur matur hevur ikki serliga gott umdømi, og eg eri samdur í, at hann er nakað fyri seg. Smakkar slettis ikki so galið, men tú skalt venja teg við hann, um tú ert kræsin. Tað eri eg, tíverri. Eitt dømi um ein rættiliga øðrvísi finskan páskarætt er mämmi.
Tá ið tú ert skiftisnæmingur, upplivir tú eisini mong fólkasløg. Eg havi møtt alt frá amerikanarum til japanarum, og tað er sera stuttligt! Stuttligast er, tá ið ein skal greiða frá, hvaðani tú ert. Fólk gerast nokkso ofta bilsin av mær, men tað hevur hent seg, at fleiri amerikanarar vita, hvar Føroyar eru og gjarna vilja koma og vitja. Tá kennir tú teg stoltan av at vera føroyingur.

Skúlaskipanin her er eisini rættiliga øðrvísi. Vit hava fimm ”periodur”, sum tað eitur. Ein ”perioda” er 6-8 vikur long, og í henni kanst tú hava upp til átta lærugreinir. Tá ið tær 6-8 vikurnar eru farnar, skal ein til roynd í lærugreinunum. Gjøgnum tey trý árini í studentaskúla hevur ein eitt ávíst tal av skeiðum í hvørjari lærugrein, sum eru kravd – eitt nú skal ein hava 6-8 skeið í svenskum fyri at fáa endaliga prógvið.
Eg haldi, at skúlaskipanin riggar stak væl. Ein

verður ikki so skúlatroyttur, sum nógv verða av at hava somu tímatalvuna alt árið eins og í Føroyum. Men, men, lætt er tað nú heldur ikki, skal eg bara viðmerkja. Sum heild havi eg havt fýra góðar mánaðir. Enn eru seks eftir, áðrenn farið verður aftur til klettarnar. Eg skilji væl, hví tað er so væl umtókt at gerast skiftisnæmingur.

Kelda: www.roddin.fo 17-05/2011

---

## SKIFTISNÆMINGUR Í NÝSÆLANDI

***Arnfríð Højgaard úr Søldarfirði er í løtuni stødd í Nýsælandi sum skiftisnæmingur. Ár hennara við AFS sum skiftisnæmingur er skjótt komið at enda, og Arnfríð hevur sent okkum eina frásøgn um ár sítt í Nýsælandi og lívið sum skiftisnæmingur.***

Eg eiti Arnfríð Højgaard og eri úr Søldarfirði. Fyri einum ári síðan byrjaði eg at fyrireika meg til at fara "út í heim" sum skiftisnæmingur. Hugsaði sjálvandi um, hvagar eg skuldi fara, men fyrsta ynski var klárt beinanvegin – tað var Avstralia. Eg helt og haldi framvegis, at tað er eitt sera spennandi land. Men eg skuldi hava tvey onnur ynski, og tað var verri at velja. Tað bleiv so Nýsæland nr. 2 og Italia nr. 3.

Umsóknin fór avstað, og alt pappírsarbeiðið varð avgreitt – tað var nógv av tí slagnum. So fingu vit vitjan av AFS-umboðum heima, sum skuldu meta, um eg var nóg búgvin til at fara. Til alla lukku søgdu tey ja! Eg væntaði heilt víst, at eg fór at fáa mítt fyrsta ynski, so eg las upp og niður um Avstralia. Bókin "Turen går til Australia" fylgdi mær, hvar eg enn fór í fleiri mánaðir.
Boðini komu í juli. Eg slapp ikki til Avstralia – mítt land varð Nýsæland! Tað fyrsta eg hugsaði var, at hetta kann ikki passa, men tað gjørdi tað. Eg varð ógvuliga skuffað, men har var onki at gera. So "Turen går til Australia" bleiv skift út við "Turen går til New Zealand". Eg fari her at nýta høvi til at viðmæla hesar bøkurnar, tær eru sera upplýsandi, bæði hvat viðvíkur mentan í landinum og øllum øðrum, ein hevur brúk fyri at vita.

Seinast í januar fór eg avstað. Tvær aðrar gentur úr Føroyum skuldu eisini til Nýsælands, og vit allar ferðaðust saman við AFS-næmingunum úr Danmark. Aftaná at hava flogið í 24 tímar lendi eg í Auckland Airport í New Zealandi. Eg var øgiliga móð orsakað av flogmøði. Tað er ein av orsøkunum til, at AFS-skiftisnæmingarnir í Nýsælandi ikki fara á legu beint eftir komu, sum tey vanliga gera í øðrum londum.

Mítt nýggja heim liggur á Norðuroynni í Nýsælandi. Býurin eitur Hawera, og har búgva umleið 11.000 íbúgvar. Vertsforeldrini eiga vaksin børn, ið ikki búgva heima. Men eg búgvi saman við tveimum øðrum AFS-gentum. Onnur er úr Turkalandi og hin úr Maylaysia. Tað er genialt! Tær eru so fittar, og vit "rigga" ordiliga væl saman. Vit læra sjálvandi eisini nógv av hvørjum øðrum, bæði hvat viðvíkur mentan og øllum gerandisligum vanum. Vit royna eisini at læra hvørja aðra okkara egna tungumál! Tað eru nógvar stuttligar løtur burturúr tí.

Eg byrjaði í skúlanum tveir dagar eftir, at eg var komin. Har ganga 800 næmingar. Orsakað av flogmøðini var eg ikki heilt klár í høvdinum, men alt lagaði seg, men tað tók á leið eina viku. Í skúlanum eru fleiri lærugreinir at velja ímillum, t.d. environmental science (umhvørvislæru), ferðavinna, gateways (lærugrein, har ein kann velja ymisk arbeiðspláss fyri at finna út av, hvat ein ætlar sær at arbeiða við í framtíðini), Chef training (har ein kann læra til professionellan kokk) og nógv annað. Eisini skipar skúlin fyri útferðum í ymsu lærugreinunum, so næmingarnir fáa eina betri fatan av tí, tey læra um og at gera lærugreinina stuttligari.

Í skúlanum eru vit ikki knýtt at einum føstum flokki sum í Føroyum, men næmingarnir eru býttir sundur í fýra hús – gult, reytt, blátt og grønt.
Í gjøgnum skúlaárið eru ymsar ítróttarkappingar, har húsini kappast um at fáa stig, við at næmingarnir í húsunum luttaka í kappingunum. Lærararnir á skúlanum eru sera fittir og hjálpsamir.
Mær dámar sera væl her í Nýsælandi. Náttúran er fantastisk, og nógv er at síggja og uppliva. Eg havi longu lært eina rúgvu bæði um meg sjálva og um, at vit øll eru so ymisk og mugu virða okkara ymiskleikar. Eg fari heilt avgjørt at mæla øðrum ungum til at verða skiftisnæmingur. Tað er ein stór persónlig avbjóðing, men eisini ein uppliving fyri lívið.

Kelda: www.roddin.fo 20-05/2011

# 5 Góða dagbók

- Lýs kenslurnar hjá gentuni
- Skriva síðan dagbókina út frá kenslum hennara

Hon setti seg upp í seingini, vakt av sínum egnu neyðarrópum. Tað var ljóst í kamarinum, men hon tordi ikki at leggja seg aftur. Hon tók seg fyri bringuna, sum var hon bangin fyri, at hjartað skuldi slíta seg leyst. Royndi at sissa seg aftur, at fáa tamarhald á andadráttinum. Andaði djúpt og læt eyguni aftur.

So leyp hon á føtur við dýnuni í kneppinum. Rann niður í stovuna og legði seg á sofuna.

Hon vaknaði aftur av telefonini. Hugdi at klokkuni. Trý korter til ellivu. So var tað ikki Sólrun, tí hon var í skúla. Hon lá pinnastill og lurtaði. Kimini kallaðu hvøll og hvøss. Skuldi hon leypa yvir og taka hana? Hon tordi ikki. Telefonin ringdi leingi. Tagdi eina løtu og so aftur at ringja.

Hon tók sær um reiggj, reistist upp úr sofuni og fór upp á vesið á loftinum. Inni í speglinum møtti hon sær sjálvari – síni egnu spegilsmynd. Gráturin var sjónskur í andlitinum. Hon tók eygnalappan og vant hann upp úr køldum vatni og turkaði andlitið.

So fór hon niður í køkin at kóka sær ein drekkamunn. Hon hevði ongan matarlyst, men royndi at noyða eina breyðflís niður í seg. Á borðinum lá dagbókin. Hon blaðaði í henni, las okkurt brot her og har. So tók hon blýantin og fór at skriva.

*Tekstbrot úr skaldsøguni Skuggar hjá Lydiu Didriksen, 1990.*



http://www.lifeintherough.com/2010/04/24/keeping-a-practice-journal/